# Atlantic Petrolium á nýggjum leiðum

**Atlantic Petrolium hækkar nú partapeningin fyri triðju ferð. Hesuferð verður tað við upp til 30 milliónum krónum, og møguleiki verður hjá útlendingum at seta pening í. Felagið verður eisini í januar/-februar tað fyrsta føroyska felagið, ið verður skrásett á føroyska virðisbrævamarknaðinum**

OLJUVINNA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Vilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petrolium, gongur nú nýggjar leiðir. Í kapitalhækkinigini, sum verður frá 16.-31. desember, verður eisini møguligt hjá útlendingum at keypa sær partabrøv. Umframt hetta, verður felagið fyrst í komandi ári, fyrsta felagið, sum verður skrásett á føroyska virðisbrævamarknaðinum*

Frá 16. - 31. desember verður møguligt hjá áhugaðum ísetarum at tekna partabrøv í Atlantic Petrolium. Tvær ferðir áður hevur felagið hækkað partapeningin, men hesuferð verður tað tó nakað øðrvísi.

Tað, sum er serligt við hesi kapitalhækkingini er, at tað nú eisini verður møguligt hjá útlendskum ísetarum at keypa sær partabrøv.

Atlantic Petrolium hevur ment seg nógv uttanfyri Føroyar í seinastuni, og felagið er við í trimum oljufeltum, sum skulu útbyggjast í enskum sjógvi.

Fyrsta feltið verður ætlandi í framleiðslu í síðst í 2006 ella fyrst í 2007, annað feltið verður ætlandi í framleiðslu síðst í 2007 og triðja feltið í 2008.

**Virðisbrævamarknaðurin**

Men um partabrøvini í Atlantic Petrolium skulu hava nakran áhuga hjá útlendsku ísetaraunum, er neyðugt, at partabrøvini verða skrásett á einum virðisbrævamarknaði. Á henda hátt ber jú til at fylgja við í hvussu stórt virðið á partabrøvinum er frá degi til dags. Hetta ger eisini keyp og sølu av partabrøvum nógv smidligari enn tað higartil hevur verið.

Tí hevur leiðslan í Atlantic Petrolium avgjørt, at skráseta felagið á føroyska virðisbrævamarknaðinum í januar/februarmánaði komandi ár. Harvið verður felagið allarhelst tað fyrsta í landinum at vera skásett.

Í hesum sambandið er felagið blivið virðismett, og kursurin er settur á 265. Hesin kursurin er ikki grundaður á um olja verður funnin, so tað er ein møguleigur eykavinningur hjá ísetarum.

Tá felagið varð stovnað í 1998, var kursurin 105, so teir umleið 2000 verandi partaeigarar hava longu vunnið higartil.

At olja júst er funnin so tætt við føroyska markið fer nokk at verkja nakað av áhuga, tá fólk síggja, at okkurt nú aftur hendir á oljuøkinum, heldur Vilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petrolium.

Finn gullið í tíni egnu fyritøku



**Nýskapan er lykilin til vøkstur. Ofta vísir tað seg, at tey góðu hugskotini eru at finna í fyritøkuni sjálvari. Hugin hjálpir tær at grava tey góðu hugskotini um nýskapan fram á ein skipaðan hátt**

Ráðgevingarfyritøkan Hugin spf. bjóðar nú føroyskum fyritøkum seminar í nýskapan.

Endamálið við seminarinum er
- at hjálpa fyritøkum at arbeiða við nýskapan á ein meira skipaðan hátt
- at fáa hugskot fram um nýskapan, ið eru í fyritøkuni júst nú
- at tryggja fyritøkuni at gerast betri at arbeiða við nýskapan á ein varandi hátt
- at koma frá hugskoti til íverksetan við ítøkiligum handlingsætlanum

Dentur verður lagdur á nýskapan innan fyri arbeiðsgongdir, tænastur, vørur og annað, ið er grundað á núverandi og komandi tørv hjá kundum ella brúkarum. Hesin hátturin at arbeiða við nýskapan – við stigvísari ella meira víðfevnandi broyting og tillaging av arbeiðsgongdum, vørum og tænastum – hevur víst seg at vera tann nýskapanin, ið gevur fyritøkunum størst búskaparligan vøkstur.

Tað ger ongan mun, um fyritøkan er privat ella almenn. Organisatiónin hevur altíð fyrimunir av at arbeiða við at nýskapa sínar arbeiðsgongdir, tænastur og vørur.

Nýskapan er eitt innanhýsis seminar, og tað er gjørt fyri at snikka saman eitt tiltak, ið er bygt á tørvin hjá tí einstøku fyritøkuni. Hetta er samstundis trygdin fyri, at fyritøkan kann arbeiða miðvíst við egnari nýskapan og seta hugskotini í verk.

Vilt tú hoyra, hvussu vit kunnu seta saman eitt nýskapanarseminar til tína fyritøku, ert tú vælkomin at venda tær til Hugin.

hugin

Spf. Hugin - ráðgevingarfyritøka, Heiðatún 3, FO-160 Argir, hugin@hugin.fo, www.hugin.fo




Jólaklæðini og jólagávuna til børn, ommu- og abbabørn finnur tú í NOA NOA miniature.

JÓLAGÁVUHUGSKOT:
Ullintir strípurtir sokkar
í gávupakka 59 kr.

Ullintir einlittir sokkar
2 stk. í gávupakka 79 kr.

NOA® NOA
Tróndargøta 26-27
tel 318200
fartel 218199

Sosialurin 341800